# Kjak



**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður*

## Fólkaheilsurákið hevur broytt lívsstílin hjá føroyingum

Tað er alt árið. Men best sæst tað í summarhálvuni, tá dagarnir eru langir og lýggir:

- Tað sæst á býarmyndini, hon er sum hamskift
- Nær sum helst og hvar sum helst sært tú fólk, sum ganga ella renna. Menn og kvinnur í øllum aldri. Og nú eru tey eisini farin at svimja á sjónum
- Úti er lív komið í, seinnapart og langt út á kvøldið, á torgum og breytum uttan fyri matstovur og kaféir – enn serliga í Havn, men ikki bara har

Heima, í skúla og barnagarði, á arbeiðsplássinum og allastaðni, har vit koma saman, er nógv blivið øðrvísi:

- Frukt og grønt á borðinum
- Sodavatnið víkir fyri svalligum vatni
- Sigarettin er koyrd útum – onki smart at roykja
- Heilsugott er eitt lyklaorð í matgerð og lívshátti
- Rørsla er gott fyri alt, og vit vilja øll vera við, hvør á sín hátt

Hetta var ikki so fyri fáum árum síðani. Úti sást tú ikki eina sjel aftaná arbeiðstíð, býurin var steindeyður. Tað kundi henda seg, at man bar eyga við onkran original, sum hættaði sær út at renna og sum ikki legði í at fólk gløddu og risti við høvdinum. Ongin tosaði um rørslu, orðið bleiv ikki brúkt um nakað, sum hevði við dagliga lívið at gera. Frukt og grønt og onnur kaninføði var meir at kalla eksotisk garnering á køksborðinum enn mett sum stimbrandi íkast í kostinum.

Nú er ein onnur verð. Haldi at fólkaheilsurákið, sum hevur tikið seg upp hesi seinastu árini, er ein høvuðsatvoldin til hesar broytingarnar í okkara lívsstíli. Og nú ið Fólkaheilsurenningin verður um vikuskiftið – so sum Útvarpið framúrskarandi hevur umrøtt alla vikuna - hevur tað ikki minst verið Fólkaheilsurenningin, ið fyrstu ferð varð í 2004, sum hevur birt upp undir hetta rákið. Og síðani øll tey óteljandi heilsuátøkini, sum feløg, arbeiðspláss, skúlar og stovnar hava skipað fyri kring alt landið.

Fólkaheilsurenningin bleiv til sum ein ímynd av Fólkaheilsuætlanini fyri Føroyar, sum varð løgd fram av politiska myndugleikanum á vári 2006, og sum allir liðir í føroyska samfelagnum hava tikið so fult og væl undir við. Hesum kunnu vit bæði gleðast um og vera stolt av. Kjarnin í Fólkaheilsurenningini er júst hesin: øll skulu kunna vera við! Hetta er ikki fyri elituna men fyri ein og hvønn sum bara tímir. Á hvørjum ári eru nógv, sum í allari mannamúgvuni í Fólkaheilsurenningini hætta sær at royna fyrstu ferð - og síðani halda á!

Kann heldur ikki lata vera við at nevna roykilógina – hon sum kom fyri góðum tveimum árum síðani og bannaði royking innandura. Tá vóru nógv í øðini. Men hygg nú! Vildi nakar í dag vent aftur? Eitt er, at vit kunnu anda frítt innandura - Haldi eisini, at onki hevur sum roykilógin elvt til, at vit hava fingið hetta spennandi íkastið til býarlívið við øllum hesum nógvu uttandura kaféunum.



**Kári á Rógvi**
*løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins*

## Heldur tvørturímóti

*Trúgvur stuðul Sjálvstýrisfloksins helt einaferð fyri, at Sjálvstýrisflokkurin er hvørki fyri ella ímóti, heldur tvørturímóti – soleiðis má í øllum førum vera í málum undir dýnuni.*

Nú hava vit ta reglu í verandi Stýrisskipan, at fyrst skal viðgerð vera á almennum tingfundi, síðani skal tingnevnd skriva álit, so skal aftur viðgerð vera – tástaðni atkvøða tingfólk, men fáa so aftur høvi nakrar dagar seinni, eftir enn meiri orðaskifti, at atkvøða endaliga. Vilja summi broyta hesa skipan, eru tey vælkomin at geva sítt íkast til innihaldsliga arbeiðið við føroyskari stjórnarskipan. Men inntil vit á rættan hátt hava tikið triðju viðgerð framum, fari eg at vísa tingfólki tað kurtheisi at líða á røður teirra, áðrenn eg atkvøði. Tí kann eg ikki svara hesum ja/nei blaðspurningum.

Lat meg samstundis nýta høvi at ynskja Eyðfinni Reyðbergi tillukku við blaðkeypinum. Vóni at hann heldur fast um, at 'soleiðis er gamla Dimma: óheft, álítandi og upplýsandi, ikki merkt av vox-pop- og kampanjujournalistikki.'

Sjálvstýrisflokkurin meldaði greitt út undan síðsta vali, at vit vildu hava tey etiskteymu málini til fólkaatkvøðu. Mál, sum vekja nóg stóran fólksligan áhuga og kunnu skiljast út frá øðrum málum eiga at vera avgjørd av fulltrúagevanum, Føroya Fólki, ikki av fulltrúunum, tingfólki. Vit tingfólk kunnu so leggja orku okkara í tey 90-99% av teimum 100-300 árligu tingmálunum, sum illa kunnu skipast sum fólkaakvøður.

Sjálvstýrisflokkurin noyðist tíverri sum liberalur flokkur at staðfesta og harmast, at Miðflokkurin setir seg uttanfyri skipað samstarv við framferð síni. Um hetta søgdu vit nýliga í yvirlýsing: "Streymoyar Sjálvstýrisfelag harmast ta óhepnu móttøku, sum forsætisráðharri Íslands hevur fingið – tjóðir okkara eru næstu systrar og eiga at sita væl um sátt og fólkaliga til borðs. Felagið ásannar í tí høpi, at meira skal gerast við rættindi hjá minnilutabólkum, ikki minst við at víðka heimildir og fíggjarkarmar hjá javnstøðunevndini og við at áseta viðkomandi rættindi í føroyskari stjórnarskrá."

Sjálvstýrisflokkurin á tingi hevur í hesum valskeiðnum roynt at fingið fokus á rættarstøðuna og praktiskan politikk uttan øsing fyri og ímóti ávísum bólkum. Vit báðir Kári P. Højgaard løgdu fram tingmál 158/2007, sum hevði víðkað rættin at sita í óskiftum búgvi, soleiðis at t.d systkin, møðgur ella ógift pør við børnum kundu ásett, at hin parturin kundi sloppið undan at skift arv. Uppskotið hevði loyst verulig vandamál í dagsins samfelagi, har so mong onnur samlív finnast enn tað siðbunda hjúnalagið, sum vit báðir Kárarnir báðir hava valt.

Og hví skal skrásett parlag handla um, hvat hendir undir dýnuni? Hví ikki velja ókynt skrásett parlag í Føroyum, so øll tey ið hava felags húsarhald (og eru før fyri at taka støðu) kunnu velja at skráseta seg, so tey fáa eina praktiska pakkaloysn, hvat viðvíkur forsorg, arvi og øðrum? Eisini hinkynd, ókynd og systkyn? Landið hevði spart tíggjutals milliónir á hvørjum ári, um øll samlivandi, sum veruliga forsyrgja hvørjum øðrum, vóru skrásett og ikki longur kravdu forsorg og pensjón sum støk. Mong heim kundu sloppið undan órógvi, um arvur ikki var skiftur.

Tí er so harmiligt at lesa, at tingfólk eru biðin um – og hava valt – at taka støðu fyri og ímóti bæði skrásettum parlagi og ávísum kynslívi í sama spurningi. Tað fyrra eiga vit at snikka til á tingi og so leggja fyri fólkið. Tað seinna eiga vit hvørki at vera fyri ella ímóti, heldur tvørturímóti.



**Hergeir Nielsen**

## Í óðum verkum?

Edva Jacobsen hevur í øllum spakføri rivið dagar og vikur, mánaðir og ár burtur úr politiska álmannakkanum og givið yvirtøkum og blokkniðurskurði frá 2001 skyldina fyri, at ABC- flokkarnir rendu samfelagið upp á turt 8- 10 ár seinni.

Einki er meiri villleiðandi enn tað sama.

Tá ið so sama Edva Jacobsen harafturat hevur sett sær fyri at yvirtaka enn fleiri mál og at lækka blokkin enn meira, ja, so er ilt at finna nakra greiða linju í politiska boðskapi hennara.

Um hon ger hetta í óðum verkum, vita vit ikki, men løgmaður hennara hevur í løgmansrøðuni 2010 boðað frá, at Edva Jacobsen og tey longu í hesi tingsetuni fara at yvirtaka:

- sakføraravirksemi,
- útlendingamál,
- sjórætt, loðslógarøki, sjóuppmerking og vitaverk, og
- ídnaðarhugverksrætt.

Fyri at tryggja sær, at blokkurin harafturat veruliga verður skorin, hava Edva Jacobsen og tey álagt sær hesa binding í sjálvum samgonguskjalinum.

Tað hevði nú verið áhugavert, um Edva Jacobsen segði okkum, hvat hesar yvirtøkur fara at kosta, og hvussu nógv blokkurin væntandi verður skorin í hesum umfarinum.

Og ófført hevði tað verið, um Edva Jacobsen so eisini kundi viðgingið, at blokkniðurskurðurin frá 2001 var ov lítil, og yvirtøkurnar ov fáar, og at tað er tí, at hon nú níggju ár seinni langar til við enn meira av sama slagi.